## Ikki ráð at fara í skúla

Þórhallur Heimisson sum er prestur á Hafnarfirði í Íslandi, skrivar á heimasíðu síni, at fleiri foreldur hava ringt til hansara og kært seg um, at tey hava ikki ráð at lata síni børn fara í skúla í dag, nú skúlarnir byrjaðu aftur aftan á summarfrítíðina. Presturin sigur við íslendskar fjølmiðlar, at foreldrini kæra seg um, at tey hava ikki pengar til at keypa tær neyðugu bøkurnar ella ymiskt annað, sum børnini skulu hava við sær í skúla. Sambært presti er talan um børn, sum skuldu í framhaldsskúla, og at í summum førum er talan um foreldur við fleiri skúlabøárnum.



## Ivi um Obama

Um góðar 100 dagar verður altjóða veðurlagsráðstevnan í Keypmannahavn, og nú er tað brádliga vorðið ivasamt, um amerikanski forsetin, Barack Obama, verður millum luttakararnar á ráðstevnuni. Danskir fjølmiðlar siga frá ónevndum keldum í amerikanska uttanríkisráðnum, at Obama hevur ongan hug at koma til Danmarkar, um hann ikki fær vissu fyri, at nakað veruliga minagott fer at spyrjast burtur úr ráðstevnuni. Danski veðurlagsráðharrin, Connie Hedegaard, sigur við DR, at hon hevur ikki mist vónina um at fáa Obama til Keypmannahavnar.

**112**

*Lagt til rættis: Rógvi Nybo, rogvi@sosialurin.fo*



# Bilur stolin í spølni

Sunnumorgunin varnaðust fólk í einum bústaði í Klaksvík, at bilur teirra var horvin úr túninum. Málið var beinanvegin meldað til løgregluna. Bilurin var seinni eftirlýstur í útvarpinum, tá tað framvegis eingi tekin vóru um bilin. Ikki fyrr enn sunnukvøldið var bilurin funnin aftur. Tá vísir tað seg so, at tað vóru fólk, ið kennast væl við eigararnar, og hava goymt bilin fyri teimum í spølni – hetta er í samband við at hesi fólkini skulu giftast, greiðir vakthavandi á Løgreglustøðini í Havn frá.

Hann greiðir somuleiðis frá, at tað nokk hevði verið ynskiligt, at komið var fram við bilinum fyrr, áðrenn alt maskinaríið hjá Løgregluni verður sett í verk.



# Fýra ferðir rúsdrekkakoyring

Fýra nýggj mál um rúsdrekkakoyring eru skrivaði um vikuskiftið. Fríggjakvøldið varð ein maður tikin á Sundsvegnum í Havn, leygarnáttina klokkan 2 varð enn ein maður tikin í miðbýnum í Havn, og aftur klokkan 4 leygarnáttin varð eitt konufólk tikið á Ringvegnum. Síðsta málið var sunnumorgunin klokkan 8 í Klaksvík, har ein triði maður varð tikin fyri at koyra við kenning.

# Rendu frontalt saman inni í tunlinum

Sunnukvøldið varð eitt ferðsluóhapp inni í Kollfjarðatunlinum. Tveir bilar, ein við føroyskum plátum á veg suðureftir og ein við norskum á veg norðeftir, rendu frontalt saman inni í tunlinum. Fýra fólk vóru í bilinum við norskum plátum, ið var á veg móti Signabø, har Norröna lá fyri veður, tí tey skuldu av landinum. Í hinum bilinum vóru tvey fólk, og eftir samanstoytin vóru øll seks fólkini flutt á Landssjúkrahúsið til kanningar, men einki verður sagt um størri fólkaskaðar. Bilarnir fóru tó illa, og eru helst blivnir vrak.

Fólkini í norska bilinum sluppu sostatt ikki við Norrönu tá hon fór avstað aftur til Danmarkar í nátt.

Hvør orsøkin til óhappið er, veit løgreglan ikki at siga enn, men báðir førararnir vóru edrúir. Málið verður kannað nærri, og løgreglan hevur onkrar ábendingar.



# Stolið av motorinum á skutara

Fríggjadagin ella fríggjakvøldið hevði onkur gjørt seg inn á ein skutara í Hoyvík. Meðan skutarin stóð parkeraður uttanfyri bústað eigarans, hevur einhvør verið og stolið partar av motorinum á skutaranum. Eingin gerningsmaður er tikin í hesum máli enn.

# Kona skotin í høvdið á Krambatanga

Herviligar beistagerðir eru framdar í Suðuroy um vikuskiftið. Á Krambatanga, har Smyril leggur at, høvdu ótangar skotið eftir fólkum við luftpistóli, og eitt nú var ein kona rakt í høvdið av hesum smáu plastikkúlunum. Kúlurnar eru sera harðar, og taka fast, so smeiturin er dyggur.

Hann, ið beistagerðina hevur framt, er fangaður, og skuldsettur fyri brot á politiviðtøkurnar. Hann hevur játt seg sekan.



## Hundurin skal ábyrgdartryggjast

Leysir hundar geva dagliga løgregluni høvuðbrýggj. Mestsum hvønn einasta dag ringja fólk og boða frá leysum hundum ymsastaðni. Løgreglan sendir síðan boð eftir aktingarmanninum hjá kommununi, ið tekur hundin upp. Vakthavandi á løgreglustøðini í Havn greiðir frá, at eigararnir av hundunum fáa 400 krónur í bót fyri at lata hundin ganga leysan. Harafturat er tað eitt lógarkrav, at tá hundurin ikki er hvølpur longur, skal hann ábyrgdartryggjast. Er hann ikki tað, so gevur tað eina bót til eigaran. Harafturat skal hundurin eisini hava eitt helsi við navninum og eigaranum í. Og tað er eftir øllum at døma ikki so sjáldan, at hundar hvørki eru tryggjaðir ella hava helsi við navni í, og tá ganga ofta upp til dagar, har hundurin er í varðhaldi hjá aktingarmanninum, áðrenn eigararnir koma eftir honum.